# Fyrstur vi› tí seinasta

## 5 fer›ir um vikuna

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin **ókeypis** restina av hesum ársfjórðinginum




# Ja!

# Sjálvandi vil eg halda Sosialin

Undirrita›i teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái bla›i› 5 fer›ir um vikuna.

Navn: ______

Bústa›ur: ______

Postnr.: ______

Bygd/b‡ur: ______

Undirskrift: ______

**Ókeypis**
Ver›ur sent óposta›
Sosialurin rindar postgjaldi›

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn





# Deildarleiðari m/k

Nýtt starv sum deildarleiðari í Klaksvík er leyst at søkja.

Uppgávan hjá viðkomandi er at hava dagligu leiðsluna av deildini í Klaksvík.

Deildin í Klaksvík er uppbygd av søludeild, forritaradeild, tekniskari deild og fyrisiting felagsins.

Í Klaksvík eru í løtuni um 20 starvsfólk.

Vit kunna bjóða eitt áhugavert starv í einum sera skiftandi og til tíðir hektiskum umhvørvi.

Leiðarin kemur, umframt at hava ábyrgd av fíggjarligu gongdini og arbeiðsfólkunum, eisini at taka lut í sølu og tænastuvirkseminum.

Kunnleiki til teldur og ymiskan ritbúnað er ein fyrimunur, men als ongin treyt.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu verða undirritaða í hendi 1. juli 2002

COM-DATA

**Com-Data P/F 736**
Postboks 19
Í Skálagarði
700 Klaksvík
Att.: Olivur Thomsen

ella email: olivur@com-data.fo

# Handilslærlingur til Ítróttarhandil

Søkt verður eftir lærling til ítróttarhandil okkara at byrja skjótast tilber. Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðsla, prísmerking/útpakking av vøru, móttøka og avgreiðsla av ordrum.
Tað er eisini møguleiki fyri at næmingurin kemur at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin 3 ferðir 14 dagar á skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, møtir til tíðina, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

**P/f Thomas Dam Ítróttur**
Postsmoga 268
FO-110 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogur og hjálparfólk til Dagstovnin i Øksnagerði

Tórshavar kommuna søkir eftir pedagogi og hjálparfólki til Dagstovnin í Øksnagerði.

**Størvini**
Talan er um tvey størv í smábarnastovuni:
- 1 starv 40 tímar um vikuna sum pedagogur
- 1 starv 40 tímar um vikuna fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi

**Stovnslýsing**
Dagstovnurin í Øksnagerði er normeraður til 40 barnagarðsbørn, 18 2-3 ára gomul børn umframt eina stovu við 10 plássum fyri børn við serligum tørvi.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv, har tit saman við leiðaranum og starvsfólkunum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin. Vit eru ein nýggjur stovnur, ið lat upp 2001. Stovurnar eru góðar og rúmligar. Vit hava útbúgvið fólk í øllum stovum. Dentur verður lagdur á at byggja eina mentan upp, og ætlanin er at gera eina endamálsorðing fyri stovnin, - og vit eru opin fyri hugskotum. Á stovninum eru uml. 19 starvsfólk.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur hugsjónir og torir at siga sína hugsan
- luttekur og mennir tað pedagogiska arbeiðið
- dugir væl at samskifta við børn, foreldur, starvsfólk og onnur

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 15. august 2002 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, tlf. 319959, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. juli 2002.

SNARSKIVAN

FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9[00]-17[00]*
*annars sambært avtalu.*
*Vøruskrá kann fáast!*

# Kvøldskrá

### Á Handilsskúlanum á Kambsdali

**Innskrivingarseðil, heysthálvan 2002**

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Føðingardagur: | |
| Gøta: | |
| Postnr./bygd: | |
| Starv/arbeiðspláss: | |
| Tel. heima: | Tel arb.: |
| Teldupost adr.: | |

**FHS-stakroyndir:** (setið x)
Virkisbúskapur C Týsd. 18.00 - 19.30 og Hósd. 19.40 - 21.10 ☐
Kunningartøkni C Týsd. 19.40 - 21.10 og Hósd. 18.00 - 19.30 ☐
Próvtøkur í mars/apríl 2003

**HH-stakroyndir:**
Virkisbúskapur B Týsd. 16.00 - 17.30 ☐
Kunningartøkni B Hósd. 18.00 - 19.30 ☐
Próvtøkur í mars/apríl 2003

**Merkonom:**
Ársroknskapur* Mánad. 18.00-20.30 ☐
Innkeyp* Týsd. 18.00-20.30 ☐
Marknaðarførsla* Týsd 18.00-20.30 ☐
Virkisbúskapur* Mikud. 18.00-20.30 ☐
* 45 tíma lærugrein. Próvtøka í desember 2002.

**Kostnaður:**
Depositum: 250,00 kr. fyri hvønn luttakara
Stakroynd, luttøkugjald: 300,00 kr. fyri hvørja stakroynd
Merkonom, luttøkugjald: 400,00 kr. fyri 45 tímalærugrein.

Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir galdandi:
- Í ársroknskapi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisfyriskipan
- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.

______
Dagur,undirskrift

Ivast tú, ring og spyr eftir lestrarvegleiðara. Fleiri upplýsingar um merkonomútbúgvingina eru at finna undir útbúgvingar á www.hsh.fo

Innskrivingarfreistin til kvøldskúlan er **1. juli. 2002.**
Skúlagongdin byrjar í viku 36. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum. Øll undirvísing er treytað av nóg góðari undirtøku.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 · Fax 444 901
Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

Sosialurin -tað loysir seg